Fønix




# ILT-TANGA VEGLEIÐING

Telefon: +298 311909

# YVIRLIT



- Vit hava opið gerandisdagar frá kl 08.00 - 17.30.
- Um tykkum tørvar bráðfeingishjálp ring **112.**
- Tilhoyri so sum fløskur, slangir og brillir, kunnu tit bíleggja frá okkum, gerandisdagar á telefon +298 31 19 09.
- Ilt-útgerðin er ogn hjá Fønix, og skal tískil latast aftur til okkara eftir brúk. Lat okkum frætta Fønix heintar útgerðina.

**Yvirlit yvir hvussu leingi iltin heldur sær**
***tá tangin er fullur***

| **DOSERING L/MIN.** | **BRÚKSTIÐ (SIRKA)** |
|---|---|
| 0,5 | 36 DAGAR |
| 1,0 | 18 DAGAR |
| 1,5 | 12 DAGAR |
| 2,0 | 9 DAGAR |
| 2,5 | 7 DAGAR |
| 3,0 | 6 DAGAR |
| 4,0 | 5 DAGAR |

# LÆR TÍN TANGA AT KENNA

1. Stussur til iltslangu
2. Stilla l/min
3. Display til tangan
4. Útloysari til tann berbara
5. Stussur til tann berbara
6. Døgg-ílat
7. Tangi við flótandi ilt
8. Hjól
9. Trýst málari







| Dømi, tá brúki er 1 l/min | |
|---|---|
| DISPLAY (LJÓS) | BRÚKSTÍÐ (SIRKA) |
| ● (gult) | 0-1 DAG |
| ● | 2 DAGAR |
| ●● | 4 DAGAR |
| ●●● | 7 DAGAR |
| ●●●● | 9 DAGAR |
| ●●●●● | 11 DAGAR |
| ●●●●●● | 13 DAGAR |
| ●●●●●●● | 15 DAGAR |
| ●●●●●●●● | 18 DAGAR |

# MANNAGOND TIL AT SETA ILT ÚTGERÐINA UPP

Fønix setur ilt-útgerðina upp fyri kunda, tá komið verður á staðið fyrstu ferð. Tó er umráðandi at lesa hesa mannagongd, so tann ið nýtir iltina, ella tann ið tekur sær av tí, er kunnaður um hvussu mannagongdin er.

1



**Display**

Trýst á tann bláa knøttin. Tær grønu perunar siga tær hvussu nógv er eftir í tanganum. Lýsir tann gula, set teg í samband við okkum.

2



**Kanna døgg-ílatið**

Døgg-ílatið samlar vatn og skal tømast javnan, soleiðis tað ikki flýtir yvir.

3



**Fuktari**

Hava tygum fingið at vita at tørvur er á fuktara, so skal fuktarin skrúvast á stussin har slangan vanligt er sett til.

**Sí mynd.**

4



**Fyll fuktara**

Skrúva lokið av fuktara, og fyll hann upp til strikuna við avkøldum kókaðum vatni, einaferð um døgnið. Skrúva síðani lokið væl á aftur.

5



**Iltslanga**

Set iltslanguna á stussin - Gev gætur, slangan skal ikki vera longri enn 15 metur.

6




**Stilla iltina inn til tín tørv**

Stilla iltina inn til tín tørv, hettar hevur læknin kunna teg um tá tú fær tangan.

7



**Aftaná brúk**

Útgerðin sløknar við at sneiða iltskamtin soleiðis hann kemur at standa á 0.




**Battarí**

Tá battaríknøtturin lýsir gult, merkir hettar at tað er lítið og einki í tanganum. Ring tá til okkara á +298 31 19 09.

# Mannagongd til, tá Helios Plus og Marathon skulu fyllast





























# TRYGDAR ÁVÍSING

- Royking er bannað nærhendis iltútgerðini

- Nýt aldrin olju, feitt ella annað líknandi til iltútgerðina - Ilt kann skapa eina kemiska reaktión við feittstoffum.



- Útgerðin má ikki flytast frá heiminum av øðrum enn Fønix.

- Nýt aldrin meira ilt, enn hvat læknin hevur kunnað teg um tú skalt brúka. Ilt-nýtslan kann bert økjast í samráð við lækna.



- Fønix tekur sær av at gera tangar aftur um teir krevja ábøtur, tískil skulu tit aldrin fara arbeiða uppá tangan sjálvi.

- Ivast tit í nøkrum, vinarliga ring til okkara á TEL: +298 31 19 09

# Fønix - TÍN ILT VEITARI




### VIRÐISGRUNDARLAG

**Fønix skal vera kent fyri:**

- at vera ein álítandi samstarvsfelagi
- at dygd, trygd og trivnaður eru í hásæti
- at øll søla og øll arbeiði vera væl úr hondum greidd til kappingarførar prísir
- at vera eitt lokkandi arbeiðspláss við skipaðum viðurskiftum á øllum økjum

### MÁLSETNINGUR

**Vit vilja støðugt arbeiða fyri:**

- at fasthalda støðuna, sum ein av fremstu fyritøkum á føroyska marknaðinum
- at skapa nøktandi fíggjarlig úrslit
- at varveita eitt fakligt og sosialt umhvørvi, soleiðis at røttu fakfólkini trívast í felagnum
- at vaksa um virksemið, við at troyta aðrar marknaðir, um hetta kann gerast við einum nøktandi fíggjarligum úrsliti, í mun til váðan

# SAMBAND

Mykinesgøta 8
FO-100 Tórshavn
Telefon: +298 311909
Teldupostur: fonix@fonix.fo

Heimasíða: www.fonix.fo




Fønix